FØROYA POLITI

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið
fisk@fisk.fo

Dagfesting: 05. januar 2024

J.nr. 5600-10167-00002-24
Málsviðgeri: BBI

Leiðsluskrivstovan

Húsagøta 3
Postboks 3018
FO-110 Tórshavn

Telefon: +298 351448

Email: politi@politi.fo

Viðv. uppskoti til broyting í løgtingslóg um ferðslu

Føroya Politi hevur fingið uppskot til broyting í løgtingslóg um ferðslu til ummælis og takkar fyri høvið at gera viðmerkingar.

Yvirskipað tekur Føroya Politi undir við ætlaðu broytingunum í uppskotinum og fegnast serliga um broytingarnar í reglunum um handhildna teleútgerð og øðrum handhildnum samskiftistólum.

Ítøkiliga hevur Føroya Politi hesar viðmerkingarnar:

Til nr. 17
Í ásetingini er víst til kapitlar og ásetingar í donsku rættargangslógini.

Rættargangslógin fyri Føroyar, sum kom í gildi 1. januar 2021, er innihaldsliga samanbærlig við donsku rættargangslógina, men tað er ein ávís forskjóting í talrekkjuni á ásetingum og kapitlum.

Í uppskotinum til § 58 f, stk. 2, nr. 1 verður víst til útgangsstøðið, at dómsmenn viðvirka í málum, har talan er um hægri revsing enn sekt. Hetta svarar til rættarstøðuna í Danmark.

Føroya Politi skal tó vísa á, at sambært § 696, stk. 2 í rættargangslógini fyri Føroyar, viðvirka dómsmenn einans í málum, har sum talan verður um revsing í 6 mánaðir ella meira.

Um samsvar skal vera ímillum ferðslulógina og rættargangslógina fyri Føroyar, eigur hetta at verða broytt.

Til nr. 21
Í stk. 4 verður heimilað landsstýrismanninum at seta reglur í gildi um annað lítið motordrivið akfar. Í serligu viðmerkingunum verður greitt frá, at reglurnar skulu nágreina, *hvørji* lítil motordrivin akfør, sum eru fevnd av banninum. Hóast viðmerkingarnar leggja upp til, at landsstýrismaðurin skal áseta hetta, er í viðmerkingunum dømi um, hvørji motordrivin akfør talan er um, t.d. el-rennihjól og segboard.

Føroya Politi mælir frá, at tað skal ásetast í kunngerð, júst hvørji motordrivin akfør eru fevnd av ásetingini. Ein yvirskipað allýsing í lógartekstinum og ein frágreiðing og dømi í viðmerkingum metir Føroya Politi verða nøktandi.

Til almennu viðmerkingarnar pkt. 1.1.6
Í almennu viðmerkingunum pkt. 1.1.6 verður víst til eitt ítøkiligt mál. Mælt verður til, at teksturin verður tillagaður og dagførdur.

Niðurstøðan hjá Landsrættinum í málinum, har sum Føroya Politi hevði lagt hald á el-rennihjól, var, at tað ikki var heimild í § 60a, stk. 2 í ferðslulógini at leggja hald á tey. El-rennihjólini vóru tí útflýggjað eigaranum aftur. Málið snúði seg einans um, hvørt el-rennihjól vóru fevnd av § 60a ella ikki.

Tað er tí rætt, sum víst verður á, at Eystari Landsrættur ikki við úrskurðinum tók støðu til, um el-rennihjólini lógligа kunnu nýtast á øki, sum ferðslulógin er galdandi fyri ella um tey kunnu krevjast skrásett.

Hóast niðurstøðuna hjá Eystara Landsrætti um, at el-rennihjól ikki eru fevnd av § 60a, hevur tað verið fatanin hjá Føroya Politi, at el-rennihjól eru fevnd av ferðslulógini, og at nýtsla av teimum á øki, sum ferðslulógin er galdandi fyri, tí er ólóglig.

Eftir at Eystari Landsrættur tók avgerð í málinum um hald kundi leggjast á el-rennihjólini, hevur ákæruvaldið ført eitt revsimál í Føroya Rætti um brot á § 55 í ferðslulógini (um ábyrgdartrygging) og § 11 í ferðslulógini (um skráseting), sbrt. § 1 í kunngerð nr. 34 frá 14. apríl 1983 um skráseting av motorakførum o.ø., fyri at hava koyrt eitt el-rennihjól á almennum parkeringsøki, hóast akfarið ikki var skrásett ella ábyrgdartryggjað.

Við dómi df. 13. juni 2023 hevur Føroya Rættur staðfest, at ferðslulógin allýsir motordrivið akfar, sum eitt og hvørt akfar, sum hevur motor sum drívmegi, og at el-rennihjól er fevnt av hesi allýsing. El-rennihjól eru tí fevnd av ferðslulógini.

Niðurstøðan hjá Føroya Rætti er, at el-rennihjól ikki lúka galdandi krøv um tilgerð og útgerð hjá akførum, og tí ikki kunnu skrásetast. Av tí at el-rennihjól ikki kunnu skrásetast, kunnu tey ikki nýtast á øki, sum ferðslulógin er galdandi fyri.

Dómurin hjá Føroya Rætti er skotin inn fyri Eystara Landsrætt, og dómurin er tí ikki endaligur. Tað er í løtuni ikki greitt, nær málið kemur fyri.

Føroya Rættur er sostatt komin til ta niðurstøðu, at el-rennihjól *eru* fevnd av ferðslulógini. Hóast hetta heldur Føroya Politi, at tað er skilagott, at tað verður nágreinað í ferðslulógini, at nýtsla av el-rennihjólum er bannað, soleiðis sum skotið er upp.

At enda skal nevnast, at Føroya Politi altíð er til reiðar at umrøða ferðslumál við Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, tá ið broytingar eru í umbúnaði. Føroya Politi hevur í løtuni ynski um aðrar broytingar á ferðsluøkinum, sum kundu verið tikin upp til umrøðu partanna millum.

Vinarliga

Katrin Thorsvig Hansen
Høvuðsákæri